# Avgerðirnar tykjast nú at fella

**Hetta vikuskiftið sendi B71 niður á plássið sum fremsti dumpikandidaturin, meðan komandi vikuskiftið fer at sýna, hvørt GÍ ella B36 hava størsta FM-trumfin í hondini**

SAMANUM
*Jákup Mørk*



*B71 og B36 tykjast stevna hvør sín veg í løtuni. B36 kann við einum sigri á GÍ stea seg á fremsta sessin, meðan B71 við tapinum fyri FS Vágum tykist á veg úr bestu deildini*

Hóast talan ikki var um fult umfar hetta vikuskiftið, so góvu teir fýra dystirnir, sum leiktir vórðu, eina greiða ábending um, hvussu støðan fer at laga seg, nú farið verður undir seinasta fjórðingin av kappingarárinum.

### Stórdystur sunnudagin

Takkað veri regluni frá í fjør, sum setir innanhýsis dystir fram um málmun, kunnu gøtumenn framvegis rópa seg fremsta liðið í landinum. Eisini hóast teir eiga ein dyst til góðar. Tann dysturin er móti HB, og verður leiktur 12. september.

Tað kann tó væl vísa seg, at fyrimunurin hjá gøtumonnum mótvegis árstalsfelagnum úr høvuðsstaðnum er um at hvørva, tí sum B36 hevur spælt seinastu umførini, so tykist spurningurin vera, um nakar yvir høvur er førur fyri at skala teir. Síðani teir taptu móti GÍ í 4. umfarinum, hevur talan verið um átta sigrar á rað í landskappingini, og fyri flestar av hesum hevur verið galdandi, at teir eru fingnir sera sannførandi til vega. Gøtumenninir hava hinvegin tókst heldur moyrir til tíðir, og tunnu bonkurin hevur viðført, at liðið hevur havt svárar trupulleikar, tá stuðulsspælarar hava verið burturfrá. Hinvegin hevur liðið - við einum undantaki - alla tíðina megna at vunnið dystirnar, og langt um leingi tykist eisini vera soleiðis, at skaddu leikararnir eru um at koma heilt fyri seg, so uttan iva verður talan um rættiliga stórdyst í Gundadali sunnudagin.

Hóast hetta í mangar mátar tykist líkjast eini FM-finalu, so er alt so langt ífrá mist hjá gøtumonnum, um so er, at teir tapa dystin komandi sunnudag. Av teimum báðum oddaliðunum hevur B36 nógv ta torførastu dystarskránna, tað sum eftir er. Tey trý seinastu umførini skulu teir fyrst til Klaksvíkar, síðani spæla torføru lokaluppgerðina móti HB, áðrenn teir at enda sleppa at enda kappingarárið í Vági. Júst har tryggjaðu teir svørt/hvítu sær annars FM fyri fýra árum síðani, og mong í árstalsfelagnum vóna helst, at talan kann gerast um eina endurtøku í ár. Eisini vildi hetta verið ein umbýtan av leiklutinum frá í fjør, tá vágbingar tóku móti FM-steypinum, eftir at hava vunnið á B36 í seinasta umfarinum.

### Tungt hjá Sandoynni

Tað er longu nakað væl síðan, at landskappingin 2001 stakk sundur í nakrar bólkar, sum hvør í sínum lagi hava ymisk endamál at stríðast fyri.

Fram til hetta vikuskiftið var tað soleiðis, at GÍ og B36 dystaðust um gullið, FS Vágar, B71 og partvíst EB/Streymur um beinleiðis niðurflytingina, meðan fimm lið - B68, VB, HB, KÍ og NSÍ øll høvdu hug at kaga móti bronsumerkjunum, sum geva atgongd til Europa, tó at tað enn ikki greitt, um hetta verður í UEFA- ella Toto-Cup.

Viðvíkjandi botninum er enn einki avgjørt. Heldur var tað soleiðis, at sigurin hjá vágamonnum á sandoyingum gjørdi støðuna enn spentari. Sandoyingar tykjast vera teir av botnliðunum, sum hava torførastu skránna eftir, og skal nøkur bjarging vera hjá teimum, skulu teir nú taka stig frá liðum, sum á pappírinum eru væl sterkari, samstundis sum vágamenn helst ikki skulu hava nakað sum helst. Eisini vigar tað ímóti hjá sandoyingum, at teir bert hava tveir heimadystir eftir. Hesir eru móti B68 og HB, og seinastu trý umførini eru sandoyingar á útivølli, so tungt verður tað undir øllum umstøðum.

Skulu vágamenn hava fleiri stig í ár, tykist besta boðið um hetta at verða komandi vikuskifti, tá teir fara á Mølina á Eiði. Uppflytararnir hava higartil í ár staðið seg sera væl, og hóast teir enn ikki kunnu siga seg heilt leysar av niðurflytingarvandanum, so skal tað vilja heilt illa til, um teir ikki í øllum førum kunnu skáka sær undan beinleiðis niðurflytingini. Megna teir so eisini at fáa trý stig móti vágamonnunum, kann við so at siga fullari vissu staðfestast, at teir hava tryggjað sær í øllum førum eitt ár afturat í fremstu mansdeildini. Gera teir hetta, er tað fyrstu ferð, at so er. Liðið hevur bert eina ferð áður verið í bestu deildini - í 1994 - men tað ferðina gekk leiðin beint niður aftur í næstbestu deildina.

### Dansurin um bronsuna

Sum sagt, so er talan ikki um nakran gullkálvavals hjá hinum fimm liðunum í deildini. Hevur talan verið um bronsudans, og hóast feltið at kalla skrædnaði eitt sindur hesaferð, so kann einki á nakran hátt takast fyri givið hesum viðvíkjandi. Óstøguð avrik hava sermerkt øll liðini í hesum bólkinum alt árið, og tað sum fyri tveimum vikum tóktist púra vist, tykist brádliga at vera púra burturvið - og øvugt.

Hvør skuldi til dømis trúð eftir fyrru kappingarhálvu, at KÍ eftir 12. umfar tykist vera ein hin fremsti biðilin til bronsuna? Støðan í seinnu hálvu er tó tann, at liðið hevur vunnið á ávíkavist gull- og silvurvinnarunum frá í fjør, og hava brádliga tikið seg fram á fjórða plássið á stigatalvuni. Harumframt tykist tað eisini vera soleiðis, at klaksvíkingar eru teir bronsubiðlarnir, sum hava á pappírinum lættastu dystirnar eftir. Hetta skilt soleiðis, at útidystirnir eru allir móti liðum, sum tykjast vera illa fyri, meðan tey sterku liðini koma til Klaksvíkar á vitjan.

Toftamenn høvdu eisini eina sera ringa byrjan upp á kappingarárið, men síðani er stevið batnað alsamt, og eftir sigurin á NSÍ tykjast teir eisini standa sterkir í bronsustríðnum. Ósigurin hjá NSÍ bendir annars á, at liðið aftur í ár má finna seg í at spæla seinastu dystirnar í ongamannalandið.

Tey bæði fremstu frá í fjør standa enn á 16 stigum, og skal talan gerast um heiðursmerki til nakran av hesum, verður tað helst HB, men hetta tykist so krevja ein sigur á GÍ í útsetta dystinum.

| Dagf./lið | GI | B36 | B68 | KI | HB | VB | NSI | EB/Str. | FSV | B71 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19-Aug | B36 (ú) | GÍ (h) | B71 (ú) | NSÍ (ú) | VB (ú) | HB (h) | KÍ (h) | FSV (h) | EB/Str. (ú) | B68 (h) |
| 26-Aug | VB (h) | FSV (ú) | EB/Str. (h) | B71 (h) | NSÍ (h) | GÍ (ú) | HB (ú) | B68 (ú) | B36 (h) | KÍ (ú) |
| 09-Sep | FSV (ú) | B68 (h) | B36 (ú) | EB/Str. (ú) | B71 (ú) | NSÍ (ú) | VB (h) | KÍ (h) | GÍ (h) | HB (h) |
| 12-Sep | HB (h) | | | | GÍ (ú) | | | | | |
| 16-Sep | NSÍ (h) | KÍ (ú) | FSV (h) | B36 (h) | EB/Str. (h) | B71(h) | GÍ (ú) | HB (ú) | B68 (ú) | VB (ú) |
| 23-Sep | B68 (ú) | HB (h) | GÍ (h) | FSV (ú) | B36 (h) | EB/Str. (ú) | B71 (h) | VB (h) | KÍ (h) | NSÍ (ú) |
| 29-Sep | B71 (h) | VB (ú) | KÍ (ú) | B68 (h) | FSV (h) | B36 (h) | EB/Str. (h) | NSÍ (ú) | HB (ú) | GÍ (ú) |

*Talvan sýnir, hvørjir dystir ymsu liðini hava eftir at leika. Í klombrum er viðmerkt, um talan er um heima- ella útidyst*



Skála-HB 0-2 (0-1)

# HB stevnir móti gullinum

**Rutineraða aðru deildar liðið hjá HB heldur framvegis fast um oddasessin í næstbestu deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*HB heldur framvegis best um oddasessin í næstbestu deildini*

Í HB var sum so eingin, sum roknaði nakað sum helst við aðru deildarliði felagsins undan kappingini. Hópurin hjá besta liðnum var rættiliga tunnur, og tí varð gjørt av, at annað lið í stóran munn skuldi setast saman av leikarum, sum áður hava verið við á besta liðnum, men sum ikki longur hava umstøður at venja somikið nógv, sum tað krevst.

Hetta hevur tó hepnast nógv betri hjá HB, enn tey flestu í felagnum høvdu roknað við. Eftir eina heldur trilvandi byrjan, hevur at kalla bert gingið framá hjá liðnum, og seinastu umførini hava teir verið heilt frammi í oddinum.

### Torført at spæla

Skuldi hetta framhaldandi vera soleiðis, var kravið sunnudagin ein sigur á Skála, sum fyrstu umførini gjørdi rættiliga nógv um seg, men orsakað av fleiri javnleikum hevur mist oddasessin.

Líkindini at spæla fótbólt á Skála vóru ikki av teimum bestu sunnudagin. Veðrið var ikki av tí allar ringasta, men váti vøllurin gjørdi, at tað var torført at fáa nakað samanhangandi spæl hjá liðunum.

Skála hevði vindin undan í fyrra hálvleiki, og tað vóru eisini teir, sum høvdu mesta spælið. Meira enn tann eina stóra møguleikan, tá Kaj Leo stórbjargaði, høvdu teir tó ikki, men fleirir gjørdist talan um hálvar kjansir, sum teir tó ikki megnaðu at gera nyttu av.

HB hevði heldur ikki teir heilt stóru møguleikarnar, men teir komu tó av og fram í álop, og ta einu ferðina eydnaðist teimum eisini at skora. Eyðun Samuelsen var staddur í høgra borði, tá hann fekk fatur á einum longum bólti, og eftir at hava drigið fram við einum manni, spældi hann bandaspæl við Hall Danielsen, so hann púra leysur við málverjanum kundi senda bóltin í kassan.

### Minniligt mál

Í seinna hálvleiki var tað so HB, sum hevði lotið undan, en teir fingu ikki trýst spælið niðan á skálahálvuna av teirri orsøk. Heldur var tað soleiðis, at heimaliðið trýsti, meðan HB so lúrdi eftir møguleikunum fyri kontraálopum.

Onkuntíð var um reppið, at tað gjørdist heilt vandamikið í báðum endum, men tá avgerandi málið so loksins kom, var tað mest sum burtur úr ongum.

HB gúppaði bóltin niðan til Svend Poulsen, og ikki meira enn komin inn um miðlinjuna, smekkaði hann til. Málverjin hjá Skála stóð heldur skeivt plaseraður, og bólturin smoygdi sær inn um stólparótina.

Bert ein lítil minuttur var nú eftir at spæla, og meðan HB'arnir fegnaðust um, at teir framhaldandi halda fast um oddasessin, máttu teir í Skála ásanna, at oddasessurin í deildini fyri fyrst er úr eygsjón.

**Skála-HB 0-2 (0-1)**
0-1: Eyðun Samuelsen
0-2: Svend Poulsen

B36-TB 1-3 (1-2):

# TB er við aftur

**Tvøroyrar Bóltfelag er nú við aftur í oddinum í næstbestu deildini. Eftir sigur í Gundadali móti B36 hava tvøramenn aftur møguleikan at vinna sæti í bestu deildini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað var annars heimaliðið, ið legði harðari út og tóktist betra liðið ta fyrstu løtuna. Tað var eisini B36, sum fekk fyrsta málið í dystinum. Rangstøðufellan hjá TB miseydnaðist, og soleiðis slapp Ragnar Poulsen ígjøgnum í vinstru síðu. Hann legði innfyri til Áka Mørk, sum púra ótarnaður kundi seta bóltin í netið til 1-0.

Eftir hesa byrjan mundu tey flestu halda, at B36 fór at halda fram við góða spælinum og vinna. B36 hevur verið sannførandi í seinastu dystunum, men tvørámenn vildu tað øðrvísi.

Tá B36 hevði lagt seg framum, var tað sumum TB slepti varseminum, ið kanska hevði eyðkent spælið inntil tá, og teir fóru niðan á vøllin í jagstranini eftir útjavnandi málinum.

Og tað var rættiliga skjótt, at bólturin var at finna í B36 netinum. Eftir hornaspark var bólturin sendur innfyri til Vagn Nolsøe, sum var staddur í málteiginum. Hann skuldi bara føra bóltin víðari í netið, og so stóð aftur á jøvnum.

Gestirnir megnaði eisini at leggja seg framum áðrenn hálvleik. TB eigur fríspark úti í vinstra borði. Tað verður sent inn í brotsteigin, har ein TB-ari hevur fótin á bóltinum, og so er TB brádliga á odda.

### B36 brennir brotsspark

Veðrið var óguliga ringt sunnudagin, og hetta darvaði spælinum nógv. Tískil var sjáldan nakað gott bóltspæl at síggja.

Eftir steðgin royndi B36 at leggja trýst á TB verjuna, men fáir málmøguleikar spurdust burturúr. B36 fekk tó eitt brotsspark miðskeiðis í seinna hálvleiki, men málverjin hjá TB tveitti seg í fulla longd og fekk vart fyri skotinum.

Eftir hetta var tað sum B36-ararnir mistu mótið, og TB var heldur vandamiklari enn heimaliðið, sum fall í fátt. Tá dysturin leið móti endanum fekk B36 eisini ein mann útvístan fyri hevnisøku, eftir at dómarin hevði bríkslað.

Tá bert fáir minuttir vóru eftir at leika, var TB-ari feldur í brotsteiginum. Dómarin dømdi brotsspark, sum hesuferð endaði í netmeskunum.

Eftir henda sigurin hevur aldursforsetin í føroyskum fótbólti tikið seg fram í oddin á stigatalvuni, men fleiri lið eru um boðið at vinna sæti í bestu deildini, og tað verður tí torført hjá TB.

**B36-TB 1-3 (1-2)**
1-0: Áki Mørk
1-1: Vagnur Nolsøe
1-2: Zoran Mancic
1-3: Zoran Mancic


